Meðan bíðað verður eftir jólum

Týtt úr enskum: Elin Mortensen

Leikarar:

Mamman _____

Jákup mammubeiggi _____

4 ensk børn _____

4 hálendsk børn _____

Santa Niklas _____

Svarti Pætur _____

4 svenskar gentur _____

2 australsk børn _____

2 italsk børn _____

Tableau: Eingil, Maria og Jósef, barnið í krubbuni, verturin og konan í herberginum, seyðamenn, vísmenninir.

Uppskot til leikbúnar: Ensku børnini kunnu t.d. vera í troyggju og puntutum skjúrti, hálendsku genturnar í kjóla, kýsa og tuflum, dreingirnir í víðum buksum og tuflum, australsku og italsku børnini í summarklæðum. Santa Nikolas í kappa og bispahúgvu, Svarti Pætur í dimmum klæðum (kanska málaður svartur í andlitinum.)

Eitt sindur um sjónleika-venjing við børnum

Fyrst verður leikurin lisin upp í síni heild. Roynt verður at gera leikin so spennandi hjá børnunum sum gjørligt.

Síðani verður ein mynd vand í senn. Børnini kunnu spæla ein part nakrar ferðir við ongum handriti (improvisatión), har børnini skiftast at hava teir ymsu leiklutirnar. Um lærarin velur »skeivt« fyrstu ferð, kann tað verða trupult at skifta seinni og ikki særa okkurt av børnunum.

Tá ið børnini hava spælt leikin nakrar ferðir og hava *skilt gongdina* í leikinum, verða leiklutirnir ásettir og handrit býtt út. — Nú verður heitt á børnini um at læra seg leiklutin uttanat.

Nú er so at vóna, at børnini sjálv duga at síggja, at summi hóska best til ein leiklut, onnur til onkran annan.

Tað hevur eisini stóran týdning at fáa børnini at skilja, at allir leiklutir eru týdningarmiklir; tey, sum arbeiða aftanfyri á pallinum, har alt skal gerast stundisliga og stillisliga, hava eins stóran týdning og tey, sum standa á palli.

Tað er heldur ikki bara tey, sum siga okkurt beint nú — ella skulu siga nógv í leikinum — sum eru týdningarmikil. Ein, sum hevur ein lítlan leiklut, kann leggja nógv afturat leikinum, um hann spælir væl í røttu løtu. Ein, sum hevur ein lítlan leiklut, kann taka nógv frá leikinum, um hann dregur ov nógv eygu at sær, tá ið hann ikki skal.

Fyrstu ferð, ið vant verður rættiliga á palli, skulu børnini læra at arbeiða aftan fyri pallin og ikki larma. Tað loysir seg at brúka nógva tíð til at venja hetta.

Royn skjótast gjørligt at áseta, hvar leikarin skal ganga og standa, tá ið hann skal siga okkurt. Tá festa setningarnir seg betur, og leikararnir vera tryggari.

Ven børnini frá byrjan at venda sær ímóti áskoðarunum, tá ið tey tosa, og at tosa *nógv* harðari og týðiligari, enn tey halda seg skulu.

Hini børnini kunnu fara oman í salin at eygleiða og lurta, um tað hoyrist nóg væl.

Royn at fáa børnini *ikki* at skunda sær. Onkuntíð hevur tað, at steðga á, mest at siga.

(Á leikpallinum ensk børn, sum sita og spæla. Mamman kemur inn.)

Mamman: Lurtið nú! Eg havi góð tíðindi at bera tykkum. Jákup mammubeiggi kemur heim at halda jól í ár. Skip hansara er komið inn í morgun, og hann kemur heim so skjótt, sum til ber, sigur hann. Eg havi beint nú prátað við hann í telefon.

1. enska: Tað var óført! Mammubeiggi er altíð so stuttligur.

2. enska: Mær dámar væl at lurta eftir honum, tá ið hann sigur frá øllum londunum, sum hann kennir.

3. enska: Tað má vera stuttligt at vera vaksin og ferðast um allan heimin.

4. enska: Ja, mammubeiggi hevur sæð og upplivað nógv.

(Jákup mammubeiggi kemur inn á pallin. Børnini renna móti honum og heilsa honum.)

Jákup: Sum eg var heppin at sleppa heim at halda jól í ár.

1. enska: Ja, men, mammubeiggi, tað er leingi enn til jólar, vit hava bara 3. desember í dag.

2. enska: Tríggjar vikur enn at bíða, keðiligt.

3. enska: Eg vildi ynskt, at okkurt var, sum æt »Meðan bíðað verður eftir jólum«!

Jákup: Nú fekk eg eitt hugskot! Tá ið eg fór úr Hálandi í gjár, gleddu børnini seg har at halda Niklasmessu.

1. enska: Hvat er tað, mammubeiggi?

Jákup: Jú, Niklasmessa verður hildin t. 6. desember á hvørjum ári... men hoyrið, eg fari ikki at siga tykkum, hvussu tey halda dagin, eg fari at *vísa* tykkum!

2. enska: Hvussu?

Jákup: Sum eina eyka jólagávu bjóði eg tykkum at koma við skipi mínum til Hálands at síggja, hvat ið har fer fram undan jólum. — Síðan fara vit til Svøríkis.

3 enska: Hví til Svøríkis?

Jákup: Hav nú bert tol, so fært tú at vita hví. Í morgin fara vit avstað, og vit eru heima aftur áðrenn jól.

(Hálendsk børn koma inn á pallin)

1. hál.: Sum eg gleði meg, nú er spennandi!

2. hál.: Onkur bankar á dyrnar! *(3. hálendska barnið letur hurðina upp. Jákup og tey ensku børnini koma inn)*

Jákup: Hesi børnini úr Onglandi vilja fegin sleppa at síggja, hvat ið hendir her á landi framman undan jólum.

3. hál.: Tit skulu vera vælkomin! Tit eru komin í røttu løtu eisini, tí vit fara nú at gera okkum til at taka ímóti Santa Niklas.

2. enska: Hvør er Santa Niklas?

1. hál.: Santa Niklas? Tað er hann, ið ber okkum gávur, tá ið vit seta skógvar okkara framman fyri eldstaðnum.

2. hál.: Ja, men bert um vit hava skikkað tykkum væl.

3. enska: Hvat hendir, um tit ikki hava skikkað tykkum væl.

3. hál.: Ja, so koyrir Svarti Pætur mold og steinar í skógvarnar.

4. enska: Er tað nakrantíð komið fyri hjá tykkum?

2. hál.: Nei, nei, ongantíð.

1. hál.: Vit skuldu beint nú fara at krógva okkum og forvitnast, tá ið teir koma at geva okkum gávurnar. Komið við!

Tey ensku børnini: Ja, latið okkum fara.

3. hál.: Skundið tykkum!

4. hál.: Bíðið eitt sindur — vit hava gloymt gularøturnar.

Tey ensku børnini: Gularøturnar?

2. hál.: Ja, vit geva altíð hestunum hjá Santa Niklasi og Svarta Pæturi gularøtur.

2. enska: Á, gera tit tað, vit geva jólanissuni greyt.
(Tey krógva seg. Santa Niklas og Svarti Pætur koma inn.)

Santa Niklas: Hygg, Pætur, alt er til reiðar, og gularøturnar hava tey ikki gloymt, síggi eg.

Svarti Pætur: Tað minnast tey altíð til. *(Teir leggja gávurnar í skógvarnar, sum børnini hava sett fram og fara. Børnini koma fram aftur.)*

1. hál.: Vit pakka ikki gávurnar upp fyrr enn í morgin.

1. enska: Takk fyri at tit hava latið okkum sæð Santa Niklas. Men soleiðis halda vit ikki jól í Onglandi.

2. hál.: Tað gera vit heldur ikki. Á jólum hava vit jólafrítíð, og vit fara í kirkju jólaaftan.

Jákup: Nú hava tit sæð Santa Niklas. Nú fara vit til Svøríkis at síggja, hvat tey havast at har. — *(Hann vendir sær ímóti teimum hálendsku børnunum)* Høvdu tykkum ikki dámt at komið við?

Tey hál. børnini: Jú, tað vilja vit fegin. *(Øll fara av pallinum).*

(Svenskar gentur koma inn á pallin. Tær eru í hvítum búnum, ein av gentunum hevur ljóskrans um hárið.)

1. svenska: Eg eri so spent. Eg skal vera ljósdrotningin, nú vit fara at halda Santa Luciu dagin, og tit eru ternur mínar. *(Hon vendir sær móti gentunum.)*

2. svenska: Vit mugu fara heilt tíðliga upp í morgin.

3. svenska: Er tað í morgin?

1. svenska: Helga, tú gloymir tað á hvørjum ári. Í morgin er 13. desember, Santa Luciu dagurin. *(Jákup mammubeiggi, tey ensku og tey hálendsku børnini koma inn á pallin.)*

1. enska: Á, sum tað er kalt í Svøríki!

1. enska: Ja, eg risti av kulda.

1. hál.: Hví hevur tú krans við ljósum á um hárið?

1. svenska: Í morgin er Santa Luciu dagurin, og eg skal vera ljósdrotningin. Vit gera okkum til reiðar nú.

2. enska: Og hvat hendir so í morgin?

1. svenska: Tað vil eg fegin siga frá. Her í Svøríki er veturin so langur og myrkur, og tí tendra vit ljós á hesum degi. Ljósini verða sett á ein krans, sum ljósdrotningin hevur um hárið.

2. svenska: Tíðliga um morgunin fer ljósdrotningin við ternum sínum hús úr húsi. Vit bjóða Luciu køkur, og vit syngja Luciu sangin. Nú skulu vit syngja fyri tykkum *(tær ganga spakuliga kring pallin, meðan tær syngja:*

Lag: Santa Lucia
Køvandi svørt er nátt,
lurta, hoyr sangin,
missir tú mál og mátt,
ljóð sum av veingjum,
tá inn um dyrnar vár,
stígur við ljós á hár
Santa Lucia, Santa Lucia.

4. svenska: Og børnini fara tíðliga upp og borðreiða fyri mammu og pápa sínum.

3. enska: Hvat gera tit so á jólum?

3. svenska: Jólaaftan fara vit í kirkju, og jólamaðurin ber okkum gávur.

(Australsk genta og drongur koma inn á pallin, tey eru summarklødd)

Jákup: Her koma børn úr fremmandum londum, síggi eg. Hvat munnu tey vilja?

Austr. genta: Vit koma úr Australiu at ynskja tykkum gleðilig jól!

1. enska: Eru tit ikki køld í summarklæðum mitt um veturin?

Austr. gentan: Nei, tí á jólum er summar í Australiu. Vit eta jóladøgurðan úti í garðinum. Vit fáa kalkun, og vit fáa gávur okkara jólamorgun.

(Italsk genta og drongur koma inn á pallin)

Ital. dr.: Vit eru úr Italiu, og vit ynskja tykkum gleðilig jól!

Italska ge.: Vit fáa gávur okkara 13. dag.

2. hál.: Sum jólasiðir eru ymiskir í teimum ymisku londunum.

(Ein eingil kemur inn á pallin)

Eingilin: Jólasiðir eru ymiskir, men jólaboðskapurin er tann sami kring allan heimin. – *(Øll fara av pallinum)*

Tableau: Eingilin, Maria og Jósef, barnið í krubbuni, verturin og konan í herberginum, seyðamenn, vísmenninir.

(Tey leikandi koma inn á pallin.)

Eingilin: »Óttist ikki, tí, sí, eg kunngeri tykkum eini stór gleðiboð, sum skulu verða fyri alt fólkið. Tí at tykkum er í dag ein Frelsari føddur, sum er Harrin Kristus í Dávids staði!«

Øll syngja: Eitt barn er føtt í Betlehem.